# Frá nót til nótar



Mynd: Beinta Haraldsen

**Fyri trimum árum síðani stóð hann á odda fyri rakstrinum av heimsins størsta nótaskipi av sínum slag, Krúnborg. Í dag syngur hann síni egnu country-løg inn í heimastudio og hevur saman við Jákupi Zachariassen stovnað felagið AEL, ið nú hálar heimsins bestu Nashville tónleikarar til Føroya at spæla saman við fleiri av Føroya fremstu sangarum**

## Samrøða

Niclas Johannesen

Petur trýstir á sína iPhone. Vit sita niðast við Áarvegin, í bygninginum sum einaferð var Djurhuus hotell, beint yvir av Café Natúr. Her angar av søgu og skeivum vinklum og tað ríkir í gamla piltræ gólvinum, tá gingið verður á tí. Nú ljóðar úr fartelefonini. Eitt fangandi og melodiskt country-lag spælir. Hetta er røddin hjá Peturi og klangurin er púrasta autentiskt country. Petur hevur skrivað sangin fyri stuttum og tað er bert eitt av mongum løgum, ið hann sjálvur hevur skrivað og innspælt. Eitt studio er innrættað í kjallaranum heima við hús uppi á Hamarinum á Argjum, har hann og konan Elsa búgva við teirra døtrum– 12 ára gomlu Barbara og 3 ára gomlu Beintu.

### Nýtt felag undir gamlari lon

Her niðast við Áarvegin hongur eitt lítið skiltið við hurðina á gomlu húsunum, vit sita í. AEL – American Euro Link – stendur skrivað við lítlum. Hetta virkar sum skrivstovuhøli fyri nýggja felagið, ið Petur hevur stovnað saman við Jákupi Zachariassen. Felagið sá dagsins ljós í snarari vend síðsta ár, aftan á at Petur og Jákup prátaðu um, at stuttligt hevði verið at gjørt okkurt saman. " Eg ringdi til Jákup og vit fóru oman til Niels Winther (advokat, blóm) og stovnaðu felagið upp á standandi fót," minnist Petur. "Hugskotið við AEL er at fáast við ymsar greinar innan tónleik og undirhald. Vit spurdu okkum sjálvar eisini: hví altíð keypa konsertir – hevði ikki eisini verið eitt hugskot at selt konsertir? Ein høvuðstanki er sostatt, at vit eisini ætla selja tiltøk og gera íløgur í ætlanir, sum vit halda síggja spennandi út. Vit fara ikki fram eftir fummum og ætla okkum ikki at gloypa um meira enn vit kunnu svølgja. So tú kanst siga, vit taka tað eitt sindur, sum tað kemur. Fyrsta tiltakið hjá okkum verður Nashville.fo, har gallakonsert og tónleikavinnudagur eru høvuðshendingarnar."

Bæði Petur og Jákup hava royndir innan tónleikin. Jákup hevur verið virkin á tónleikapallinum í mong ár, bæði sum studio eigari og tónleikari – og ikki minst sum oddamaður fyri føroyskum fløguframleiðslum í Nashville, USA. Petur hevur, umframt at hava givið tvær útgávur út undir egnum navni, seinastu árini, gjøgnum felagið Five Star Entertainment, eisini nomið sær royndir innan vinnuliga partin av tónleiki. Sum við so nógvum av tí, ið Petur velur at fara í holt við, fær tú fatan av, at hugurin til nýggjar avbjóðingar drívir verkið, og tá tað snýr seg um Five Star Entertainment, so var søgan ikki heilt ólík søguni um AEL.

"Konuni og døtrunum dáma væl karrybollar, so eg sat henda eina dagin í City og fekk mær burgara – karry er onki fyri meg – tá Bogi Andreasen við einum ovfarnum eygnabrá stingur høvdið inn um hurðina í grillstovuni. Hann sigur mær hugskotið við nýggja felagnum og soleiðis gjørdist eg partur av Five Star Entertainment." Hetta felagið hevur seinastu árini eitt nú staðið fyri stóru konsertunum við Bryan Adams á Tórsvølli og Kris Kristofferson í Ítróttarhøllini á Hálsi. "Tann vegin havi eg fingið

Sosialurin